DAGSINS MEINING

Nýtt samstarv – positivt tekin

Tað er einki at taka seg aftur í, at føroyingar og grønlendingar áttu at samstarva meiri. Tað er tí eitt positivt tekin, at nýggju fólkatingslimirnir úr Grønlandi og tann eini fólkatingslimurin úr Føroyum hava skipað seg í ein bólk - Norðuratlantsbólkurin.

Vit hava havt fleiri politikkarar, sum hava lagt dent á norðurlendskt samstarv. M.a. stríddist fyrrverandi formaður Javnaðarfloksins, Petur Mohr Dam, bæði sum løgmaður og tingmaður fyri øktum vinnuligum samstarvi millum føroyingar og grønlendingar, eins og hann virkaði fyri øktum føroyskum veiðirættindum í Grønlandi. Eisini virkaði fyrrverandi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum, Erlendur Patursson, fyri norðurlendskum samstarvi.

Nú er ein nýggj dimensjón komin í hetta samstarvið á fólkatingið. M.a. tí at her eru tríggir sjálvstýrissinnaðir politikkarar á vinstraveingi, sum óivað kunnu fáa nakað burtur úr størri samstarvi, hóast tað óivað er stórur munur á áskoðanunum.

Samstundis sum føroyingar seinastu árini eru vorðnir meiri tilvitandi um, at vit eiga at skunda undir at fáa ein sjálvberandi búskap, og samstundis taka størri ábyrgd á okkum, so tykjast grønlendingar eisini at verða meiri tilvitandi um henda spurning í dag.

Inuit Atagatigiit - flokkurin á vinstraveingi - hevur alla sína tíð verið rættiliga sjálvstýrissinnaður, meðan Siumut - grønlendski javnaðarflokkurin - ikki hevur lagt dent á sjálvstýrispolitikk. Men hann hevur flutt seg, og ásannar nú, at Grønland og grønlendingar mugu miðja ímóti at standa á egnum beinum, bæði politiskt og búskaparliga. Vø.o. er líkt til, at hann er um at yvirhála systurflokkin í Føroyum, Javnaðarflokkin.

Mótvegis Lars Emil Johansen, Kupik Kleist og Høgna Hoydal hevur Lisbeth Petersen ikki leitað upp í Norðuratlantsbólkin, men ístaðin upp í Vinstraflokkin. Gundgevingin hjá henni er, at Sambandsflokkurin hevur altíð arbeitt saman við Vinstra. Tað hevur hon rætt til, og tað skal ikki fáa nakra viðmerking um. Hinvegin tóktist tað løgið, tá hon undan tingfundinum í síðstu viku boðaði frá, at hon ætlaði ikki at taka orðið. Hon hevði hildið sína jomfrúrøðu í 1988. Álvaratos, er tað ikki at halda teir 7000 veljararnar, sum valdu Sambandsflokkin fyri gjøldur?

Tað er at fegnast um, at grønlendingar og føroyingar økja samstarvið á Kristiansborg. Bara spell, at Sambandsflokkuin ikki er við. Hóast umboðini eru ósamd um ríkisrættarliga spurningin, kundu tey óivað samstarva til gagns fyri Føroya og Grønland á øðrum økjum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Læknahølini

Beate L. Samuelsen
formaður í Sosialu Nevnd

Tá Sosala nevnd Tórshavnar Býráðs á fundi eftir hálvan september í ár fekk boðini um, at nýggjundi kommunulæknin endiliga var settur, vóru hetta góð tíðindi.

Men at ein nýsettur kommunulækni skal hava tann møguleikan framum aðrar at flyta inn í spildurnýggj høli í Gundadali, helt eg, vera sera løgið.

Sjálvandi skulu høli verða tøk til allar kommunulæknar, og ein 9. kann ikki koma uppá tal, fyrr enn 9 høli eru tøk. Tað sigur seg sjálvt. Vit kunnu ikki hava nýggju kommunulæknar, og bert 8 viðtaluhølir! Tað var eisini kravið frá landsstýrinum.

Og sjálvandi kann ein 9. kommunulækni ikki byrja í starvinum fyrr enn vitaluhølini eru liðug, men harfyri stendur onga staðni, at tey júst eru ætlað til tann nýggjasta kommunulæknan.

Í uppskotinum til innstilling, sum tú Elin, nevnir, stendur »...soleiðis, at læknin kann byrja, samstundis sum viðtaluhølini eru liðug«.

Sjálvandi.

Hann kann ikki byrja fyrr enn læknahølini eru liðug. Tí áðrenn læknahøli eru tøk at rúma øllum okkara kommunulæknum, kann ein nýggjur ikki byrja. Tað sigur seg sjálvt.

Men tað stendur ongastaðni, at nýsetti kommunulæknin skal flyta inn í læknamistøðina í Gundadali.

Einki er til hindurs fyri, at ein av verandi kommunulæknunum seinastu fimm árini, og við um 1200 klientum, fær nýggjastu hølini, og hin nýsetti, í hesum førinum hin nýggjundi, flytir inn í nýístandsettu læknahølini í J. Paturssonargøtu.

Hesa avgerð, sum ein meiriluti í Sosialu nevnd samtykti á fundi 18. september í ár, kundi bæði nýsetti læknin og onnur fingið at vita alt fyri eitt, men av tí at minnilutin í nevndini, Elin Lindenskov og Hildur Eyðunsdóttir, vildu hava málið fyri býráðið, kom málið ikki fyri har fyrr enn á fyrsta býráðsfundi eftir hesa avgerð, og har samstykt av samgonguni. Og tað var 4. oktober, fýra dagar eftir, at læknahølini skuldu verði liðug.

Tey eru framvegis ikki liðug.

Leggjast kann aftrat, at tann vend, málið nú hevur fingið, snýr seg ikki um læknahølini, men parkeringsviðurskiftini, sum ikki eru av teimum bestu í J. Paturssonargøtu. Men tað hevur deild hjá kommununi fingið boð um at viðka, so tey verða meiri hóskandi til viðtaluviðurskiftini hjá nýggja kommunulæknanum, sum vit samstundis ynskja hjartaliga vælkomnum til Tórshavnar Kommunu.

Vit hava rættiliga nógv brúk fyri hesum lækna í kommunu okkara, og vóna, at tað ikki gongur alt ov long tíð, til fleiri kommunulæknar verða settir her. Tí nýggju kommunulæknar eru ikki nøktandi tal til eina so stóra kommunu sum okkara, ið telur yvir 18.000 íbúgvar.

FAS verður dýrt fyri kommunurnar

Sofus D. Johannesen
Gjógv, 9. December 2001

Í 1988 varð føroyska skattalógin broytt, so hon tók hædd fyri tí tá nýggju DIS-skipanini, sum var komin í gildi Danmark.

Hendan DIS-skipanin umfatar sjófólk við farmaskipum, og hon virkar á tann hátt, at inntøkan, hesi sjófólk fáa, er skattafrí. Broytingin í føroysku skattalógini gjørdu føroyingarnar, sigla við donskum farmaskipum, skattafrían í Føroyum eisini.

Hendan skipanin vísti seg tó skjótt at raka onkrar kommunur, har stórur partur av skattaborgarunum sigldu við donskum handilsskipum, sera hart. Tá vit so í Føroyum fingu okkara egnu altjóða skipaskrá, FAS, varð hendan skipað eitt sindur øðrvísi.

Teir, sum sigla við skipum í FAS-skipanini, gjalda nevniliga vanligan skatt í Føroyum, og so fáa reiðaríini endurrindað 28% av útgoldnum hýrum aftur úr landskassanum. Føroysku kommunurnar endurrinda síðani landskassanum sín part av hesum gjaldi. Gjaldið verður býtt út á allar kommunurnar, uttan mun til um nakar borgari í einstaku kommununi er við skipi undir hesari skipan ella ikki.

Tað eru tó ikki bert føroyingar, ið sigla við hesum skipum. Útlendingarnir, sum eru við, gjalda 35% í skatti til Føroyar, og tá reiðaríini "bert" fáa endurgoldið 28% er klárt, at nakað av skattapeningi liggur eftir í Føroyum.

Men.

Kommununar part av skattinum hjá hesum útlendingunum fær tann kommunan, har skipið er skrásett! Og tá helst øll hesi skipini eru skrásett í Tórshavnar kommunu vil tað siga, at Tórshavnar kommuna fær allan hendan skattin.

Altso: Útreiðslurnar til skipanina verða goldnar av øllum kommununum, meðan inntøkurnar fara til Tórshavnar kommunu.

Higartil hava ikki so nógv skip verið í skipanini, so rokningin til kommunurnar hevur "bert" verið "nakrar fáar milliónir" um árið. Og tað hava kommunurnar higartil latið sær lynda.

Men tá fiskimálaráðharrin nú tosar um at gera skipanina meira attraktiva, soleiðis at hópin fleiri og større skip skulu koma í skipanina, mega kommununar, sum gjalda til skipanina siga frá, tí hetta fer at leggja stórar byrðar á flest allar kommununar, meðan Havnar kommuna fær allan vinningin.

Mín áheitan skal tí vera á landsins myndugleikar at taka hesa skipan upp til nýggja viðgerð, so hon ikki gerst ein stórur kleppur fyri flest allar kommunur í Føroyum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Framtaksgrunnurin mótvegis Vinnumálastýrinum

Birgir Mohr
Sandi

Síðan Framtaksgrunnurin setti størsta partin av peningi sínum í ávikavist Fiskavirking og Fiskasøluna, hevur afturvendandi tosið millum manna verið, um og nær grunnurin fór at megna at einskilja (privatisera) hesar fyritøkur aftur, soleiðis sum ætlanin var av fyrstan tíð. Ella var/er tað ikki ætlanin?

Loysnin við Fiskavirking var ein sokallað kreppuloysn. Tíðin hevur broytt viðurskiftini síðani tá munandi. Tann parturin av vinnuni, ið ikki gjørdist partur av kreppuloysnini, fann nýggjar leiðir.

Nýggj framleiðslu- og søluvirki sóu dagsins ljós, og felags fyri flest øll hesi privatu virki er, at tey eru grundað á privatan íløgupening, har møguligt tap bert kann tengjast at eigarfyrsta stig á leiðini er at velja eina felags nevnd fyri báðar tær stóru fyritøkurnar, soleiðis at henda kann fara undir eitt miðvíst arbeiðið at samansjóða virksemið, ella á annan hátt fáa almenna peningin inn aftur í grunnin, at nýta til endamálið: nýggjar vinnur.

Fyri tey,ið hava fylgt virkseminum hjá ávikavist Fiskavirking og Fiskasøluni farnu árini, er hetta at frøast um, tí vit hava sæð tvinnar almennar fyritøkur, ið hava virkað í kapping við hvørja aðra. Stóri taparin í hesum spælinum er almenni íleggjarin og tey smáu, privatu framleiðsluvirkini.

Allar fyritøkur hava farnu árini verið í beinleiðis kapping um rávøruna. Prísurin á rávøruni, ið keypt verður á uppboðssøluni, er øktur so mikið nógv, at privatar framleiðslufyritøkur hava tropult at fylgja við, tí hesar ikki arbeiða við somu karmum, sum almennu fyritøkurnar gera. Partur av hesi rávøru er fluttur ótilvirkaður av landinum og var hetta neyvan við í ætlanunum, tá kreppuloysnin varð sett í verk.

Gamaní skal leggjast afturat, at fiskimaðurin hevur fingið meira í sín part og er tað at frøast um, og somuleiðis hava skipini gingið rímuliga væl.

Úrslitið av hesum er, at avkastið hjá hesum báðum fyritøkum, bæði í mun til umsetning og eginpening, er so lutfalsliga vánaligt, at Framtaksgrunnurin ikki hevur sett seg føran fyri at einskilja fyritøkurnar aftur.

Fyri stuttum kom ein nevnd, sett av Føroya Lands stýri, við einum áliti um hvørjar almennar fyritøku, við mettum fyrimunum, kunnu einskiljast. Ovast á listanum standa »sjálvsagt« Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasøla.

Eg havi alla tíðina verið teirri sannføring, at politiski myndugleikin kann seta út í kortið, hvønn veg vinnulívið skal fara, ikki neyðturviliga áseta, hvussu hetta neyvt skal gerast. Er tað so, at landsstýrismaðurin við vinnumálum vil leggja allar detailætlanirnar fyri vinnulívið sjálvur, so er ikki neyðugt at hava nevndir og leiðslur í fyritøkunum.

Men hesa hugsan hevur verið í fleiri ár innan almanna- og heilsuøkið. Hetta ógvisliga stig tær hava tikið, fer kanska at gera, at tað nú endiliga fer at koma vend í, og at okkurt fer at henda á hesum økinum.

Tí B6 er so sanniliga ikki tann einasta deildin ella arbeiðsplássið innan almanna- og heilsuøkið, sum hevur hendan trupulleikan. Trupulleikin talan er um, er at deildir og arbeiðspláss eru undirnormeraði, soleiðis at arbeiðsbyrðan verður alt ov stór hjá teimum, sum starvast har til dagligt. Harafturat hevur viðlíkahald og endurnýggjan av hjálpitólum, amboðum og innbúgvi verið so at siga eingin. Leiðslurnar goyma seg aftan fyri sparingar og fíggjarstøðu sum heild. Eisini pástanda tær, at talan er, í hvussu so er ikki um undirnormering, og tosa um normeringar á deildum og arbeiðsplássum ymsastaðni uttanlands. Hví tosa tær ikki út frá tí, sum veruliga hendir ár aftan á ár her í Føroyum? Nevnliga at arbeiðsbyrðan á deildum og arbeiðsplássum er so stór, at neyðugt er at brúka tímalønt fólk alt árið runt. Talar tað ikki fyri seg? Vísir tað ikki at normeringarnar eru ov lágar? Eg meini so við, - hetta er ikki nakað, sum er hent eitt ár og á einum arbeiðsplássi. Nei, hetta er nakað, sum hendir ár aftan á ár og á fleiri arbeiðsplássum innan almanna- og heilsuøkið runt um í Føroyum. Hvussu ber tað til, at í hundraðtúsindavís av krónum uttan víðari kunnu brúkast ár aftan á ár til tímalønir, men at sama upphædd ikki kann brúkast til fastar lønir? Eg rokni við, at tað er ein gáta fyri Føroya fólki, at almanna- og heilsustýrið og landstýrismaðurin á almanna- og heilsuøkinum einki hava gjørt við hetta, øll hesi árini, hetta hevur verið soleiðis. Onkur vil kanska meina, at tað botnar í kreppuni, sum Føroyar land hevur verið í, og allar sparingarnar, sum hava verið í kjalarvørrinum av tí. Men álvaratos, er Føroya land í kreppu enn? Er tað ikki uppá tíðina, at vit koma eitt stig víðari? Føroya fólk hevur lagt rygg til alla kreppuna, - hava tey tann borgarligi vinnumálaráðharrin kanska ikki? Og ilt er at síggja, hvørji serlig politisk fyrilit skulu vera uppi í hesum málinum, sum landsstýrismaðurin skal taka?

Í farnu viku var landsstýrismaðurin í vinnumálum frammi í Útvarpi Føroya, har hann gav til kennar, at hann var ímóti ætlanunum hjá nevndini í Framtaksgrunninum. Ein nevnd, ið vinnumálastýrið sjálvt hevur sett og sum tað vónandi eisini hevur sett sítt álit á.

Grundgevingarnar hjá landsstýrismannininum vóru tvinnar. Onnur var, at talan er um aðrar fyritøkur í Føroyum, ið selja sínar vørur ígjøgnum Føroya Fiskasølu, og hin at væntast kann at fleiri av hesum fyritøkum kunnu koma í likviditetstrupulleikar?

Vanligt hevur verið, at tær fyritøkur, ið ikki tillaga seg nýggjar og broyttar umstøður, enda fyritakssemi sítt, og er tað ein natúrligur partur av vinnuligum hugsjónum.

Eins og gjørt varð fyrst í nítiárunum, koma hesar fyritøkur uttan iva at finna nýggjar leiðir, um tær framhaldandi ikki kunnu samantvinna við annaðhvørt Fiskavirking ella Fiskasøluna. Tær velja møguliga at samvinna við onkra av verandi sølufyritøkunum, ella stovnseta egið sølulið til tess at umseta egna framleiðslu.

Hin grundgevingin, at fyritøkur kunnu fáa likviditetstrupulleikar, er ein trupulleiki, sum hvør fyritøka sær eigur at taka upp við egnan fíggingarstovn. Tað kann ikki vera rætt í einum framkomnum samfelag, at sølufyritøkurnar skulu virka sum fíggingarstovnar.

Eg vildi mett og vóni, at peningastovnsfólk eru betur egnað til at meta um likviditet, kreditvirði og annars fíggjarviðurskifti, enn tey fólk, ið starvast í søluliðnum. Er tað ikki so, kann hugsast, at sølufólkini í Føroyum nýta ov nógva orku til hesi viðurskifti, ístaðin til tað arbeiði, tey eru best til.

Eftir stendur so spurningurin, hví landsstýrismaðurin er ímóti nýggja leistinum hjá Framtaksgrunninum. Er talan um veruliga umsorgan fyri einstøku privatu framleiðsluvirkjunum, ella liggur onnur dagsskrá fjald aftan fyri útsagnirnar?

Hugsast kann, at gomlu »vinnulívsmenn« okkara fegnir vildu sloppið upp í part aftur, nú framleiðsluvirkini hjá Fiskavirking eru niðurskrivað og sostatt bíligari at reka samanborið við tíðina innan Fiskavirking gjørdist veruleiki.

Uttan mun til hvat hendir í næstum, er tað hugstoytt at upplivað, at hægsta vinnulívsumboð okkara ikki leggur seg eftir at skapa karmarnar og síðan letur vinnuna sjálva finna leiðir innan hesar karmar, tí politikarar skulu ikki reka vinnulívið.

Talan er her um veruligt brot á vinnulívshugsjónina (liberalismuna), og verður nú í størri mun at samanlíkna við planbúskap. Spurningurin er um hugsjónin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum er gagnlig fyri føroyska samfelagið í framtíðini, ella bert gagnlig fyri einstakar vinnulívsmenn?

Ella hevur Fólkaflokkurin slept liberalismuni til fyrimuns fyri planbúskap í høvuðsvinnu okkara? Tað er lítið høpi í at einskilja almennar uppgávur sum t.d. ferðafólkaflutning, meðan fiskaframleiðsla og fiskasøla skulu vera almenn og stýrd av politikara!

Her er okkurt, sum vit vanlig fólk ikki skilja, tí má okkurt vera fjalt fyri almenninginum, men tað kanska Vinnumálastýrið fer at greiða okkum nærri frá.

B6 einki eindømi

Majbrith Reynskor
380 Sørvágur

Í hesum døgum eru nógv eygu vend ímóti B6 á Landsjúkrahúsinum. Bæði einstaklingar og feløg hava úttalað seg og hava víst sympati við sjúkrasystrunum, sum hava sagt seg úr starvi. Tað hevur verið gott at sæð og hoyrt argumentini, sum nógv eru komin við; tí tey hava týðiliga víst, at nógv eru, sum skilja støðuna og síggja, hvussu skeivt leiðslan ber seg at.

Eg vil eisini vísa sjúkrasystrunum á B6 sympati. Eg haldi, at tað er so flott, at tær í felag tráðka fram og vísa Føroya fólki á ein trupulleika, sum hevur ikki uppiborið at sleppa burtur úr henni aftur?

Øll fólk vita at skal eitt samfelag veita eina tænastu, so kostar tað pengar. Skal tænastan vera umfatandi og góð, so kostar hon nógv, og hevur samfelagið ikki pengar nokk til at veita eina tílíka tænastu, ja so má tænastan vera tað minni; - tað má í hvussu so er vera samsvar millum støddina av tænastu og støddina av pengum. Soleiðis er eisini innan almanna- og heilsuøkið. Politikarar hava sett út í kortið, at í Føroyum skulu vit hava eitt almanna- og heilsuverk, sum veitir tænastur til fólkið; men tað virkar sum um, teir halda, at teir kunnu fáa hesa tænastu uppá tilboð. Er hetta ikki vanvirðing av fíggjarstøðu sum heild. Hetta ógvisliga stig tær hava tikið, fer kanska at gera, at tað nú endiliga fer at koma vend í, og at okkurt fer at henda á hesum økinum.

Tí B6 er so sanniliga ikki tann einasta deildin ella arbeiðsplássið innan almanna- og heilsuøkið, sum hevur hendan trupulleikan. Trupulleikin talan er um, er at deildir og arbeiðspláss eru undirnormeraði, soleiðis at arbeiðsbyrðan verður alt ov stór hjá teimum, sum starvast har til dagligt. Harafturat hevur viðlíkahald og endurnýggjan av hjálpitólum, amboðum og innbúgvi verið so at siga eingin. Leiðslurnar goyma seg aftan fyri sparingar og serútbúðnum fólkið við drúgvum royndum?

Eitt gamalt orðatak sigur, at tann, ið tigur, hann samtykkjur. Skal tøgnin frá almanna- og heilsustýrinum og frá landstýrismanninum á almanna- og heilsuøkinum tulkast sum um, at tey samtykkja við leiðsluna á Landsjúkrahúsinum? Hóast ein rúgva av argumentum hava verið frammi um, at tey bera seg skeivt at. Og hvussu verður við øðrum deildum og arbeiðsplássum innan almanna- og heilsuøkið? Skulu fleiri noyðast at taka so ógvislig stig, áðrenn vend kemur í?

Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!